# Siðiligi Schuster

**FÓTBÓLTUR Tað er ein maður, sum hevur roynt eina rúgvu sum spælari og venjari, sum vitjar á Svangaskarði í morgin. Bernd Schuster er eitt tað størsta navni í týskum fótbólti nakrantíð**

Uni Holm Johannesen

– Vit vistu, at Víkingur hugsaði fyrst og fremst um at verja. Tí flutti eg fleiri leikarar á teirra leikhálvu, og tað eydnaðist. Tað vil ikki siga, at vit spæla so framrættað hvørja ferð, men sum heild eru vit eitt lið, sum vil leypa á.

Hann tekur sjáldan munnin ov fullan. Og tað er hansara eyðkenni.

Navnið er Bernd Schuster. Sum leikari hevði hann stóra ávirkan á týskan landsliðsfótbólt. Hann var millum annað við til at vinna EM í 1980. Øll 1980-árini var hann millum undangongumenninar hjá Barcelona, áðrenn hann óvæntað skifti til fíggindarnar í Real Madrid í 1988.

Sum venjari hevur hann staðið á odda fyri Getafe og Real Madrid.

Í morgin situr hann í venjaraskýlinum á Svangaskarði, tá Besiktas vitjar Víking.

### Víðagitin

Bernd Schuster var eitt tað størsta navni í Týsklandi fyri 25 árum síðan. Hann var sera væl lýddur sum spælari. Hann tók ongantíð munnin ov fullan og rokaðist ikki ov nøgv. Hann var altíð realistiskur. Og soleiðis er hann eisini sum venjari.

Eitt, sum Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi, noyddist at sanna aftaná dystin móti Besiktas í farnu viku.

– Bernd Schuster segði eftir dystin, at hann var imponeraður av spælarunum hjá Víkingi, og hann hevði sjáldan sæð so góða disiplin, segði Jógvan Martin Olsen aftaná dystin við Sosialin.

Tað kom sera óvart á, at Schuster valdi at skifta úr Barcelona til Real Madrid. Hann staðfesti tá, at hann hevði tørv á nýggjum avbjóðingum. Men hóast hann elskar at vinna, so var tað ikki væntað av honum, at hann fór soleiðis at traðka fjeppararnar úr Katalonia á tærnar.

### Venjari hjá Real Madrid

Bernd Schuster hevur eisini havt viðgongd sum fótbóltsvenjari. Hann hevur ferðast víða. Hann hevur verið venjari hjá liðum í Týsklandi, Spania, Ukreina og Turkalandi.

Hann setti seg í venjarasessin í Besiktas í summar. Undan tí stóð hann á odda fyri stórfelagnum Real Madrid, har hann hevði stóra viðgongd. Felagið vann meistaraheitið í 2008. Liðið spældi framrættaðan, flottan og skjótan fótbólt, og sum heild var hann væl dámdur sum venjari. Tað er hesin stílurin, sum hann er eyðkendur fyri sum venjari.

Hann takkaði fyri seg í Real Madrid í desember í 2008, tí felagið hevði mist fleiri stig í kappingini um meistaraheitið.

Í árunum frá 2005 til 2007 stóð hann á odda fyri Getafe, har hann festi grundvøllin, sum Michael Laudrup seinni arbeiddi víðari við.

### Gavst tíðliga

Schuster gavst tíðliga sum spælari á týska landsliðnum. Hann er skrásettur fyri 21 altjóða dystir í alt í árunum frá 1980 til 1984. Sum 24 ára gamal varð hann ósamdur við týska fótbóltssambandið, sum hevði við sær, at hann takkaði fyri seg. Hann spældi ongantíð aftur á landsliðnum.

### Stórar ætlanir

Schuster hevur stórar ætlanir sum venjari hjá Besiktas. Hann hevur fyrr í summar gjørt greitt, at felagið skal vinna meistaraheitið, steypakappingina og Europe League. Og fyrsti knúturin, sum skal loysast á longu leiðini, eru dystirnir móti Víkingi.

Besiktas vann í farnu viku 3-0 móti Víkingi. Í morgin verður seinni dysturin millum liðini. Hann fer neyvan at siga ov nøgv áðrenn og aftaná dystin, men hann ætlar sær heilt víst at vinna.

*uni@sosialurin.fo*



**Navn:** Bernhard Schuster
**Føðingardagur:** 22. desember, 1959
**Tjóðskapur:** Týskland
**Felag:** Besiktas
**Hevur áður vant:**
**1997-1998:** Fortuna Koln
**1998-1999:** 1. FC Koln
**2001-2003:** Xerez CD
**2003-2004:** Shakhtar Donetsk
**2004-2005:** Levante
**2005-2007:** Getafe
**2007-2008:** Real Madrid
**2010- :** Besiktas



VINNARAR

*Torkil Veyhe, sum vann í fjør, og Hafsteinn Ægir Geirsson, sum vann fýra tey undanfarnu árini, eru saman við 52 øðrum súkklarum klárir at herja á, tá Statoil Kring Føroyar byrjar í kvøld í Klaksvík*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Leggja til brots í kvøld

**SÚKKLING Tilsamans 54 súkklarar eru við í stóru súkklukappingini, Statoil Kring Føroyar, sum fer í gongd í kvøld við prologi í Klaksvík**

Hilmar Jan Hansen

Í evstu løtu eru fýra súkklarar aftrat komnir upp í stóra hópin, sum fer at kappast restina av hesi vikuni, nú Statoil Kring Føroyar er á skránni fimtandu árið á rað. Hetta er nógv tað mesta nakrantíð, og einki bendir á, at spenningurin heldur verður minni, enn hann hevur verið undanfarnar ferðir.

Hvussu tey ymsu liðini verða mannað, hevur lítið verið at frætt um, men í gjárkvøldið høvdu fyrireikararnir fingið fráboðan um átta lið. Tey kundu verið væl fleiri, um teir mongu danskararnir eisini tóku seg saman í lið, men sum skilst, verða teir allir við sum einstaklingar í staðin.

Vinnarin av kappingini í fjør, Torkil Veyhe, hevur aftur í ár Gudmund Joensen og Gunnar Dahl-Olsen aftrat sær, og teir vunnu saman liðkappingina í fjør. Hafsteinn Ægir Geirsson, sum hevði vunnið einstaklingakappingina fýra tey undanfarnu árini, hevur aftur í ár tveir aðrar sterkar íslendingar aftrat sær, umframt at teir tríggir súkklararnir úr Belgia koyra sum eitt lið. Annars eru eisini fýra onnur føroysk lið og eitt íslendskt, so liðkappingin sær lovandi út.

### Byrja í Klaksvík

Lagt verður til brots í Klaksvík í kvøld klokkan 18, tá prologurin er á skránni. Súkklaður verður ein einkultstartur upp á 15 kilometrar, og tá fæst ikki minst ein ábending um, hvussu sterkir teir mongu súkklararnir eru, sum ikki áður hava verið at sæð í Statoil Kring Føroyar.

Og longu í morgin og ovurmorgin eru tveir teir mest krevjandi teinarnir á skránni. Fyrst í morgin í Eysturoynni, tá byrjað verður í Havn og síðani koyrt til Glyvrar umvegis Selatrað. Og fríggjadagin verður súkklað í Suðuroynni, so hesar báðar dagarnar bjóðar kappingin tveir harðar teinar, sum tilsamans eru 184 kilometrar til longdar við bæði longum og brøttum brekkum, ið kunnu fáa rættiliga avgerandi týdning.

Leygardagin verður aftur ein einkultstartur, sum fyri fyrstu ferð er í Vágum, har súkklað verður úr Sandavági til Bíggjar og aftur, og sunnudagin er so aftur ein langur teinur, tá farið verður úr Tjørnuvík til Havnar, umvegis Saksun, Oyggjarvegin og Gomlurætt. Málið henda síðsta dagin verður við Gamla Apotek í miðbýnum í Havn.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Víkingur og Besiktas á Svangaskarði

Dysturin millum Víking og turkiska stórliðið, Besiktas, verður í annaðkvøld kl 19.00 á Toftum. Dysturin er í Europa League kappingini.
Víkingur tapti fyrra dystin 3-0 í Turkalandi. Millum kendu leikarnir á Besiktas liðnum eru Reber Rustu, Nihat Kahveci og Ricardo Quaresma.